


*Mazda6 fær sera góð skotsmál, og bilurin hevur longu fingið fleiri heiðursmerki. Her sýnir Axel Ljósheim, sølumaður hjá Berg Motor bilin fram*

# Mazda6 – elegantur, sportligur og ein fragd at koyra

**Mazda6, sum avloysir Mazda 626, hevur fingið ómetaliga góða móttøku síðan hann kom á marknaðin í fjør. Motorjournalistar siga, at bilurin hevur alt tað, sum forgangarin manglaði, hesin er elegantur, sportligur og ein fragd at koyra**

Bilar
*Magnus Gunnarsson*

Mazda6 er komin sum avloysari fyri Mazda 626.

Mazda6 hevur elegant design og koyrieginleikar, sum eru fult á hædd við evropisku kappingarneytarnar.

Bilurin er størri enn forgangarin og er nú ein tann størsti í miðalklassanum.

Kabinan er vorðin meira innbjóðandi og sportlig við t. d. alulook á instrumentborðinum. Sama er galdandi fyri koyrieginleikarnar, har ein nýggjur undirvognur ger, at bilurin hevur sportligar koyrieginleikar og er ein sonn fragd at koyra.

Bensinmotorarnir eru allir nýggir og eru gjørdir úr aluminium. Motorarnir eru: 1,8 litur við 120 hk, 2,0 litur við 141 hk og 2,3 litur við 166 hk.

Á trygdarøkinum eru eisini stór framstig, og bilurin hevur nógva innbygda trygd sum t. d. airbag framman, í síðunum og gardinairbag og »antipiskesmæld« setur, sum verja høvur og nakka við ein samanstoyt ella harða uppbremsing.

Standard útgerðin er sera umfatandi so sum aircondition, el-síðurútar framman, el-síðuspegl og rattið kann stillast allar vegir.

Bilurin fæst eisini við fartpiloti, leðurratti, hita í setrunum og DSC, sum elektroniskt ansar eftir, at bilurin ikki glíður út í svingum.

Mazda6, ið verður gjørdur sum sedan, hatchback og stationcar, fæst í útgávunum Comfort, Touring og Sport.

Motorjournalistar og bilbløð geva Mazda6 sera góð skotsmál, og bilurin hevur longu fingið fleiri heiðurslønir.

Um ólavsøkumundið kemur Mazda6 við einum Commonrail dieselmortori við 136 hk.




## Mazda6 1,8 Comfort sedan

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1,8 litur 4 syl. bensin 120 hk |
| 0-100 km/t | 10,7 sek |
| Bensinnýtsla | 12,0 km/l (blandað koyring) |
| Dekkstødd | 195/65-15 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 468,0 cm |
| Breidd | 178,0 cm |
| Hædd | 143,5 cm |
| Eginvekt | 1250 kg |
| Totalvekt | 1850 kg |
| Viðførisrúm | 500 litrar |
| Prísur | kr. 198.700,- |
| Søluumboð | Berg Motors<br>Staravegur<br>FO-100 Tórshavn<br>Tel.313535 |

# Mazda2 - gjørdur í Evropa til evropearar

**Mazda2 er fyrsti Mazda sum verður gjørdur í Evrpoa. Bilurin, ið er avloysari hjá Mazda Demio, verður gjørdur í Valencia í Spania. Mazda2 verður einans gjørdur sum hatchback við 5 hurðum**




Bilar
*Magnus Gunnarsson*

Mazda2 er ein heilt nýggjur bilur, sum verður gjørdur í Valencia í Spania. Bilurin verður gjørdur á somu verksmiðju sum Ford Fiesta, Fussion og Ka. Mazda2 er gjørdur í sama stýli sum Mazda6, viðvíkjandi designi og innrætting við t.d. alulook innan.

Talan er um ein 5 persónabil við 330 litra viðførisrúmi. Lessihæddin aftan er lág, so lætt er at leggja størri lutir inn í bilin. Um baksetrini og høgra forsetur verða løgd fram, er pláss fyri tveimum súkklum í bilinum. Innan er eisini gott pláss, og bilurin er góður at koma inn í. Nakkapúturnar aftan kunnu koyrast heilt niður, so tær ikki taka útsýnið, tá tær ikki eru í brúk.

Bilurin fæst við 1,2 litur, 1,4 litur og 1,6 litur bensinmotorum og 1,4 litur common-rail dieselmotori. Trygdin er eins og í størri bilum við t. d. ABS bremsuskipan og DSC (Dynamic Stability Control), airbag framman, í síðunum og gardinairbag. Mazda2 verður einans gjørdur sum hatchback við 5 hurðum. Mazda koma at gera nógv við at marknaðarføra Mazda2.

*Mazda2 verður gjørdur í Valencia í Spania*

# Mazda3 - nýggjur avloysari hjá Mazda 323

**Fyrst kom Mazda6, Mazda2 er á veg og seinni kemur Mazda3 at avloysa Mazda 323. Bilurin varð sýndur fram á bilaframsýningini í Genéve sum konseptbilurin MX Sportif. Mazda3 er hevur smart design og sportligar koyrieginleikar**

Bilar
*Magnus Gunnarsson*




*Smartur bilur og elegant design. Baklyktirnar eru í sama stili sum á Mazda6*

Tað gongur hart fyri seg hjá Mazda í hesum døgum, tá nýggj modell koma á marknaðin næstan hvørt ár. Fyrst kom Mazda6, Mazda2 og RX8 eru á veg, samstundis sum tað ikki verður leingi, til ein avloysari fyri Mazda 323 kemur á marknaðin. Konceptbilurin Mazda MX Sportif, ið bleiv sýndur fram á bilaframsýningini Genéve, verður avloysari fyri Mazda 323. Navnið verður Mazda3. Talan er um ein bil sum verður bygdur yvir sama plattform sum ein komandi Ford Focus. Mazda hava heilt broytt stíl, nú leggja teir seg eftir at gera familjubilar við sportligum designi og koyrieginleikum. Enn hava vit ikki nógvar upplýsingar um nýggja Mazda3, men hann kemur at fáast við einum framkomnum 2,0 litur motori, sum lýkur tey strongu japansku ULEV-umhvørviskrøvini (Ultra Low Emission Vehicle).